# Ísland lán úr Póllandi

Ísland fekk í gjár endaliga tilsøgn um at læna 150 milliónir evrur ella 1,1 milliard krónur frá polsku stjórnini. Londini hava tingast eina tíð um lánið og samdust endaliga, tá íslendski fíggjarmálaráðharrin, Steingrimur J. Sigfússon, og polski starvsbróður hansara, Jan Vincent-Rostowski, vóru á fundi í altjóða gjaldoyragrunninum IMF í gjár. Eftir semjuni skulu íslendingar rinda póllendingum lánið aftur eftir tíggju árum. Frammanundan hevur IMF lænt íslendsku stjórnini 10 milliardir krónur, men enn hava íslendingar bara fingið helmingin av láninum.



# Írar hjálpa Íslandi

Avgerðin hjá írsku veljarunum at taka undir við Lissabonsáttmálanum kann hava týdning fryri íslendsku umsóknina um limaskap í Evropasamveldinum. Tá írar vrakaðu sáttmálan í fjør, fekk tað ES at útseta umsóknina frá Kroatia um limaskap. Íslendsku fjølmiðlarnir skriva, at íslendska umsóknin hevði fingið somu lagnu, um írar eisini høvdu sagt nei nú, tí fleiri av limalondunum eru ímóti at taka nýggj lond uppí, fyrr enn semja er fingin um framtíðarbygnaðin. Tað er ógreitt, hvussu skjótt samráðingarnar um íslendskan limaskap kunnu ganga. Tey mest bjartskygnu hava sagt, at tað kann taka tvey ár.



*Fiskimenn standa spyrjandi, nú politiski myndugleikin vil umleggja alla inntøkutrygd fiskimanna*

*Mynd: Karstin Vang*

Sørensen, sum Sosialurin tosaði við í síðstu viku.

Viberg er eisini við í nevndini, sum landsstýrið hevur sett til at gera tilmæli um eina nýggja mynstulønarskipan, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu umsita og gjalda.

Hann heldur ikki, at viðurskiftini eru so einføld, sum búskaparfrøðingurin vil gera tey til.

- Nú fáa vit at síggja, hvat fer at spyrjast burtur úr hesum. Tó at 0 (null) krónur standa á uppskotinum til fíggjarlóg til inntøkutrygd, eiga fiskimenn ikki at fara í panikk. Vit hava eina løgtingslóg, sum sigur, at fiski- og útrórðarmenn skulu hava minstuløn – líkamikið, hvat stendur á fíggjarlógini.

Viberg vísir á, at politiski myndugleikin hevur gjørt av, at vinnan sjálv skal hava størri ávirkan og skal sleppa at taka aktivt lut í, hvussu stýringin av inntøkutrygdini skal verða.

- Skipanin við inntøkutrygd hevur verið ein ógvuliga góð skipan, og fiskiskipavinnan hevði slett ikki kunnað verið hana fyriuttan. Tað kann hon heldur ikki í dag, sigur hann.

## Alment ískoyti

Viberg Sørensen leggur dent á, at landskassin fer ikki at sleppa púrasta snikkaleysur í eini nýggjari skipan, sum hann tekur til.

- Nei, tað ber ikki til, leggur hann dent á.

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag vísir á, at ætlanin nú er at skipa ein grunn, sum skal stýra hesum viðurskiftum.

- Her verðu í hvussu er neyðugt, at tað almenna tekur lut í eini byrjunartíð, sigur Viberg Sørensen, sum enn ikki dugir at siga ítøkiliga, hvussu eitt tilmæli til landsstýrismannin kann koma at síggja út.



*Tað eru langfarafiskimenn, sum fáa forskot úr Forskotsgrunni Fiskimanna, meðan teir eru burtur*

# Forskotið eisini ávirkað

**Forskotsgrunnur fiskimanna, sum hevur syrgt fyri, at langfarafiskimenn fáa forskot, tá teir eru burtur, verður eisini ávirkaður av, at inntøkutrygdin skal leggjast út til partarnar á arbeiðsmarknaðinum**

INNTØKUTRYGD

*Vilmund Jacobsen*

*vilmund@sosialurin.fo*

Uppi í inntøkutrygdini ella minstulønini, sum fiskimenn fáa, tá veiða ella fiskaprísir svíkja, er eisini Forskotsgrunnur Fiskimanna, sum hevur til uppgávu at rinda langfarafiskimonnum forskot, meðan teir eru burtur.

Forskotið, sum hesir menn fáa útgoldið, verður afturrindað av reiðríunum nakrar vikur eftir, at lastin er løgd upp.

Forskotið, sum langfarafiskimenn fáa, er 20.000 krónur um mánaðin.

Spurdur um forskotið hevur nakað við inntøkutrygdina annars at gera, sigur deildarstjórin á Lønjavningarstovuni, at tað hevur tað.

- Tað er soleiðis, at forskotið, sum vit gjalda út, hevur trygd í inntøkutrygdini hjá fiskimonnum. Soleiðis virkar eisini forskotsskipanin undir inntøkutrygdini, sum politiski myndugleikin nú ætlar at leggja út til arbeiðsmarknaðin at umsita og – við tíðini – eisini at gjalda, sigur Hanni Thomsen.